## Hósdagur 13. september

### SVF

18.30 Gloymdar leikur 4:13
18.40 Jumanji 21
19.05 Hitt dýrabara havið – avstr. dokumentarsending
20.00 Dagur og Vika við Grannum Okkara
20.35 Horvin – donsk dokumentarsending
21.05 Ally McBeal – amerikonsk røð
21.50 Ein øld verður fagnað 10:10 – am. dokumentarrøð
22.35 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2 – ensk krimirøð
23.25 Liðugt

### Eurosport.com

07:30 GOLF: US PGA Tour - Bell Canadian Open in Montreal, Canada
08:30 CAR RACING: AutoMagazine
09:00 SUPER RACING WEEKEND(tm): Eurosport Super Racing Weekend(tm) Magazine
09:30 CYCLING: Tour of Spain
10:30 SAILING: Sailing World
11:00 SAILING: Sailing Rolex Cup at St. Thomas, U.S. Virgin Islands
11:30 GOLF: US PGA Tour - Bell Canadian Open in Montreal, Canada
12:30 CYCLING: Tour of Spain
13:30 CYCLING (live): Tour of Spain
16:30 XTREME SPORTS: YOZ ACTION
17:00 VOLLEYBALL: Men's European Championships in Ostrava, Czech Republic
18:00 VOLLEYBALL: Men's European Championships in Ostrava, Czech Republic
20:00 FOOTBALL: UEFA Cup
22:00 NEWS: Eurosportnews report
22:15 FOOTBALL: UEFA Cup
00:15 NEWS: Eurosportnews report
00:30 CLOSE

### BBC PRIME

0.00 TLZ: »American Visions – The Wilderness and the West«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Angels of Mercy«
2.00 TLZ: »Adverts – The Ad Factor«
2.30 TLZ: »Somewhere a Wall came down«
2.55 TLZ: »Pause«
3.00 TLZ: »A New Way of Life«
3.30 TLZ: »Never Mind the Quality?«
4.00 TLZ: »Back to the Floor – Changing Homes«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tropical Rainforests – People of the Forest«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – On the Road«
5.30 TLZ: »Teen English Zone«
5.55 Joshua Jones: »Spook«
6.05 Playdays
6.25 The Really Wild Show- Amazon
6.50 Celebrity Ready Steady Cook: »Michelle Collins & Darcey Bussell«
7.20 Gary Rhodes' New British Classics Alfresco
7.50 Real Rooms: »Patsy's Derby Bedroom«
8.20 Going for a Song
8.50 Style Challenge: »Boy Band - Catch«
9.15 Zoo
9.45 Vets in Practice: »Running Out of Time«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Frontios«
11.30 Classic Eastenders
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthrop Investigates: »Eye Witness«
13.25 Celebrity Ready Steady Cook: »Jilly Goolden & Jeremy Spake«
13.55 Style Challenge: »Bad Hair Day«
14.20 Joshua Jones: »Spook«
14.30 Playdays
14.50 The Really Wild Show- Amazon
15.15 Totp Eurochart
15.45 Great Antiques Hunt: »Leicester«
16.15 Gardeners' World
16.50 Miss Marple: »The Body in the Library«
17.45 The Weakest Link
18.30 Cardiac Arrest: »You Can't Make An Omelette«
19.00 Eastenders
19.30 Heartburn Hotel
20.00 Down to Earth: »Oh Best Beloved«
21.00 French & Saunders
21.30 Seeking Pleasure: »Wedding List«
22.10 Holiday Snaps: »Comp – Majorca/Ibiza/Prt Grimaud/Sanremo«
22.30 Muscle
23.00 Out of Hours

### BBC WORLD

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Question Of Peace
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Talking Movies (r)
9:00 BBC News
9:30 Question Of Peace (r)
10:00 BBC News
10:30 Holiday (r)
11:00 BBC News
11:30 USA Direct (r)
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Question Of Peace (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 Question Of Peace (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

### TV 3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter (G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom (G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:15 Pæn pige - sej sild
13:45 Interne affærer
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Felicity
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Tilbage til fremtiden 2
22:05 Sex, løgn og sensationer
23:10 Vore værste år
23:40 Simpsons
00:10 Ti tommelfingre
00:40 Interne affærer (G)
01:40 Ricki Lake(G)
02:35 Vore værste år (G)
03:05 Simpsons(G)
03:30 Sunset Beach
04:15 Godnat

### ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
Hallgrím Johannesen á Skála lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
Kári Olsen og Dia Midjord leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.05 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Samdust um frið, men berjast enn (e)
Frásøgn eftir Árna Joensen.
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e)
Hallgrím Johannesen á Skála lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
Beinta og Elsa Maria skipa fyri.
10.10 Tit skriva, vit spæla
Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e)
Heðin Arge stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Handan hav (e)
Tónleikasending hjá Fróða Løkságarð
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
Victor Carlsen leggur til rættis
18.00 Barnaútvarpið
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Tónleikur
19.00 Hvussu við mær?
Framhaldssøga eftir Colby Radowsky. Knút Olsen týddi. Katarina Nolsøe lesur. 4. partur
19.30 Løg mær dámar
20.00 Ljóðmúrurin
Bjarni Mohr leggur til rættis.
21.00 Fimleikaløtan 3 (e)
Beinta og Elsa Maria skipa fyri.
21.05 Dagsetur
Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Tíðindi

## Felicity (4)

*- amerikonsk dramarøð*




Felicity fyrireikar seg at fara í býin við Noel, eftir at hann hevur kist hana. Meghan er beinanvegin klár at spreiða rygtið, og tá Felicity vinnur eitt køliskáp í einum eydnuspæli, sum Noel skipar fyri, trúgva øll uppá rygtið. Tá Felicity og Julie fara at vaska klæðir, so hitta tær báðar unga filmmannin Zach, sum hevur trupulleikar við at vaska litað klæði.

## Back to the future 2

*- amerikanskur filmur*




Hesin filmurin byrjar, tá tann síðsta filmurin endaði. Marty má hesaferð aftur til framtíðina í árinum 2015 fyri at bjarga sínum framtíðar børnum frá einari vanlagnu. Í 2015 finnur Marty ein ítróttarálmunakka, sum vil geva honum ríkdóm. Tann einasti, sum stendur í vegin fyri hesum, er mótstøðumaðurin Biff, sum stjelur álmunakkan.

Hetta hevur við sær stórar trupulleikar fyri Hill Valley, og Marty má og skal finna eina loysn...

### Rás 2

09:45 Orðið
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Go'morin
Skráin, veðrið, aktuelt, dagsins mál, prát við lurtarar og tónleikur.
11:00 Birgir Beinleiðis
Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi
12:10 Lættur tónleikur
13:30 Ynskiløtan
Heilsur frá lurtarunum Laila Jacobsen er vertur. Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
15:00 Tíðindi
15:10 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Lættur tónleikur
17:00 Norðlýsið
Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík
John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi
18:10 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini EvR Sending
Andaligur búnaðskapur: "Týdningurin av dagligum samfelagi við Gud"
Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e), Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone,
Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

### Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan
Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. middnátt

# ítróttur

Nr. 172 • fríggjadagur • 7. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Allan saknaði Pól




*Spurningurin tykist vera, um hetta var seiansta ferðin, at Allan Simonsen stóð framman fyri føroysku pressuni á heimavølli*
*Mynd: Jonhard Hammer*

**Venjarin hjá føroyska liðnum ásannaði, at hansara lið hevði havt stórar trupulleikar, og at mótstøðan hevði verið sum ongantíð áður**

VENJARIN
*Jóannes Simonsen*

Kanska var tað seinasta ferðin, at hann hitti pressuna eftir ein landsdyst hjá føroyingum á heimavølli. Sáttmálaskeiðið millum Allan Simonsen og Fótbóltssambandið verður liðugt, tá dysturin í Slovenia leygardagin 6. oktober verður liðugt spældur. Enn hevur einki verið at hoyrt, um samstarvið, sum hevur verið síðani í februar 1994, fer at halda fram, ella um FSF skal finna ein nýggjan venjara.

Onkra ferðina hesi átta árini hevur Allan Simonsen verið vónbrotin eftir dystarlok. Mikukvøldið hevði liðið hjá honum tapt 3–0, men venjarin var ikki vónbrotin:

– Tá mótstøðumenninir eru so dugnaligir og so uppsettir, so er tað meiri enn torført. Teir vóru skjótir, bólttryggir og hugflogs ríkir. Í ein tíma var orduligur klassamunur, og teir kundu havt skorað uppaftur fleiri mál.

– Tá mótstøðumenninir eru so góðir, er tað torført at spæla á føroyska landsliðnum, men kortini haldi eg, at ov nógvir av okkara í 1. hálvleiki spældu væl undir miðal. Teir hava ofta vísti betri avrik, enn teir gjørdu hesa ferð. Eitt nú í Moskva í mars mánað, staðfesti Allan Simonsen, sum ikki ivaðist í, at Russland verður við í HM endaspælinum, og at teir fara at hava møguleika at gera um seg.

### Saknurin

Landsliðsvenjarin vísti serliga á 18 ára gamla Marat Izmailov, sum serliga í 1. hálvleiki mól runt við føroysku spælarunum og næstan gjørdi sum hann vildi:

– Tað var ógvuliga torført at fáa fatur á honum. Vit royndu einar tríggjar loysnir, men tað riggaði ikki. Longu undan dystinum vistu vit, at tað fór at vera torført ímóti honum. Tá vit fyrireikaðu okkum, hugsaði eg, hvussu kærkomið tað hevði havt verið, um Pól Thorsteinsson hevði verið tøkur. Hann hevur serlig evni til sovornar uppgávur, og eg eri vísur í, at hann væl hevði megnað at tikið sær av unga manninum, sum reikaði so nógv og var arkitekturin aftanfyri tað mesta hjá teimum.

### Punkteraður miðvøllur

Ein dystur restar í undankappingini. Hann verður í Slovenia, og venjarin føroyski venjarin hevur sítt at hugsa um. Miðvallararnir Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson fingu gult kort mikukvøldið, og teir eru báðir leikbannaðir næstu ferð. Ein av monnunum, sum hevur verið við í kappingini um miðvallarplássini, er Sámal Joensen. Hann er skaddur, og hann verður neyvan tøkur á landsliðnum um ein mánað. Pól Thorsteinsson hevur verið smáskaddur. Ivaleyst hevði venjarin verið fegin, um B36 maðurin var tøkur aftur á landsliðnum.

– Tá vit hava fingið henda dystin afturum, fara vit at hugsa um næstu uppgávuna. Tað verður torført, men tað er ikki so langt síðani, at okkara menn stóðu seg væl á Balkan, sigur Allan Simonsen.

# Romanzev russari av gamla slagnum

**Russiski venjarin segðist vera væl nøgdur, men hann helt seg burtur og sendi í staðin hjálparvenjaran á tíðindafundin**

TÍÐINDAFUNDUR
*Jóannes Hansen*

Nú eru tað nøkur ár síðani kommunisman fall, og Sovjetsamveldið datt sundur. Tað eru heilt øðrvísi tíðir eystanfyri. Tað sást eisini á Tórsvølli mikukvøldið. Umleið 70 russiskir sjómenn vóru millum áskoðararnar, og teir fagnaðu sínum liði á sama hátt, sum vestureuropeiskir áskoðarar altíð hava gjørt. Hevði tað verið fyri fimtan árum síðani, so høvdu russarar á áskoðaraplássunum neyvan veittrað við fløggum, rópum og lúrum.

Ivan Eginson leiddi tíðindafundin. Allan Simonsen tosaði danskt, og Ivan Eginson umsetti til russiskt. Høvdu kommunistarnir rátt fyri borgum í Moskva, so hevði Ivan ongantíð havt fingið møguleikan at flyta til Føroya og at gerast føroyingur – ikki uttan at hann hevði sett lívið upp á spæl í roynd at flýggja.

Men hóast broytingarnar í Russlandi, so var kortini eitt minni um gomlu og tilknappaðu tíðina at hóma mikukvøldið. Tá dysturin var liðugur, vórðu dyrnar til russiska skiftisrúmið læstar, og tað var ikki møguleiki fyri at fáa venjaran, Oleg Romanzev, sum er ein av týdningarmiklastu persónunum í russiskum fótbólti, at hitta umboðini fyri føroyska og russiska almenningin.

Tá Allan Simonsen í eina góða løtu hevði tosað við pressuna, kom russiski hjálparvenjarin, Mikhail Gershkovich, á tíðindafundin. Tað var týðuligt, at hetta ikki var ein partur av arbeiðnum, sum gestirnir gingu so høgt uppí, sum venjarin hjá føroyska liðnum veit, at tað er neyðugt at gera.

– Men eg vil undirstrika, at tað er als ikki talan um nakra vanvirðing av føroyingum og Føroyum. Oleg Romanzev plagar ikki at koma á tíðindafundirnar, uttan mun til hvørjum Russland hevur spælt ímóti, visti Ivan Eginson at siga.

### Enn restar nakað

Russiski hjálparvenjarin var sjálvandi væl nøgdur, men hann vildi ikki siga, at nú liggur vegurin hjá Russlandi til Japan og Korea breiður og opin:

– Pressan hevur í fleiri mánar roknað okkum sum næstan sjálvskrivaðar í endaspælinum. Soleiðis hugsa vit ikki. Tað er alneyðugt at vinna, tá Sveis kemur til Moskva. Megna vit tað, so hava vit tryggjað okkum. Vit eru sera væl nøgdir við avrikið hjá okkum í dag. Nógvir spælarar vístu so gott avrik, sum teir kunnu megna, og tað var hugaligt, at teir vístu rætta hugburðin og á allan hátt vóru professionellir.

### Munurin

Pressan vildi vita, hvussu tað bar til, at russiska landsliðið spældi so nógv betri hesa ferð, enn tað gjørdi, tá føroyingar í mars vóru í Moskva:

– Eg havi stóra virðing fyri føroyska liðnum, sum í flestu dystunum í hesari kappingini hevur staðið seg sera væl. Tá teir vóru í Moskva, var tað framvegis vetur í Russlandi. Tað sást aftur á vøllinum, sum tað ikki bar til at spæla rættuligan fótbólt á. Í Føroyum var undirlendið gott at spæla á, og tað gagnaði heilt víst okkara monnum, sum spældu soleiðis, sum teir eru bestir til og sum teimum líkar best, staðfesti russiski hjálparvenjarin, áðrenn hann saman við restini av russiska fylginum fór í bussarnar og av aftur landinum.